# Tað góða samfelagið hevur hægstu raðfesting á fíggjarlóggini



HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður

**Tað vil eg vísa lesarunum á í nøkrum fylgjandi greinastubbum um vælferðarpolitisku uppraðfestingarnar í fíggjarlógarlógaruppskotinum fyri 2007**

Tá vit í vár fóru undir arbeiðið við fíggjarlógini fyri komandi ár, gjørdu vit av í landsstýrinum, at nú tá afturgongdin sýntist at venda til viðrák skuldi tað síggjast aftur í nøkrum góðum vælferðarpolitiskum uppraðfestingum. Tað gleðir meg, at vit hava fingið rúm fyri einum stórum parti av hesum raðfestingum fyri tí góða samfelagnum, serliga við øktu játtanunum á almanna- og heilsuøkinum.

Tað fari eg at vísa á í nøkrum greinastubbum, har høvuðsøkini verða hesi:

1) Familjupolitisk átøk: 10,2 mió. kr.
2) Heilsuverk og heilsuátøk: 9,1 -
3) Pensjonistar og eldraøkið: 13,6 -
4) Rúmligur arbeiðsmarknaður: 2,2 -
5) Sosialpolitiskar íløgur: 5,6 -

Hetta eru tilsamans 41 mió. kr. Og hetta eru reinar uppraðfestingar – tvs. at øll tølini sum standa í yvirlitinum er tað, sum vit leggja omaná, til nýggj framtøk, aftaná at pengar eru settir av til lønarhækkingar og aðrar neyðugar hækkingar í rakstrinum.

**partur: Familjupolitisk átøk**

Her snýr tað seg ikki um at hækka onkra onkra einstaka veiting, men heldur at hugsa um viðurskiftini hjá barnafamiljunum, har høvuðsdenturin verður lagdur á truplar umstøður hjá veikum familjum.

Tey ítøkiligi familjupolitisku átøkini á fíggjarlógini eru hesi:

| | |
|---|---|
| Barnaískoyti til familjur við truplum korum | 3,8 mió. kr. |
| Løggáva um lutaíbúðafeløg, ráðgeving | 0,4 - |
| Stuðlar til familjur við fjølbrekaðum børnum | 2,2 - |
| Heilsutænastur f. børn og ung, í heimi og skúla | 0.8 - |
| Stovnstilboð til børn og ung hjá veikum familjum | 1,6 - |
| Uppbygging av barna- og ungdómspsykiatri | 0,8 - |
| Ráðgevandi toymi fyri ungar kvinnur | 0,5 - |
| Berin, sorgbólkur fyri børn og vaksin | 0,1 - |
| **Íalt** | **10,2 -** |

Haraftrat koma hesi familjupolitisku átøkini uttan fyri fíggjarlógina:

Løggáva um rætt hjá tímaløntum at vera heima hjá sjúkum barni
Barsilsgjald til ung undir útbúgving
Nýggj lóg um felags foreldrarætt
Fleksibul barsilsskipan yvir 12 mánaðir

**Innihaldið í familjupolitisku raðfestingunum**

Eg vil við fáum orðum royna at lýsa, hvat hesi mál snúgva seg um. Haraftrat er lesarin altíð vælkomin at seta seg í samband við Almanna- og heilsumálaráðið á tlf. 30 40 50 og spyrja seg fyri.

Barnaískoytið: Samstundis sum barnafrádrátturin í skattinum verður lagdur um til ein barnastuðul sum eitt kontant útgjald, kunnu forsyrgjarar – stakir ella pør - við eini húsarhaldsinntøku undir eitt vist mark søkja um eitt ískoyti til barnastuðulin. Henda upphæddin er fyri hálvt ár – í 2008 skal upphæddin minst upp 8 mió. kr..

Lutaíbúðafeløg: Avsetta upphæddin er til gjald fyri serfrøðingahjálp til at gjøgnumføra ein bústaðarpolitiskan refom í hesi tingsetuni, sum skal skapa lógargrundarlag fyri lutaíbúðafeløgum, serliga ætlað til láginntøkubólkar sum ung, smábarnafamiljur og vardar íbúðir til eldri og til fólk við serligum tørvi.

Stuðlar til børn: Størri fíggjarlig og sosialpedagogisk orka skal setast av til familjur við børnum, sum ikki kunnu verða í vanligu kommunalu dagstovnunum, so sum fjølbrekaði børn og onnur.

Heilsufrøðiskipanin, ið vitjar í heiminum hjá smábarnafamiljunum og fylgir børnunum í skúlanum, skal styrkjast við 2 heilsufrøðingum. Í 2008 skal hon aftur styrkjast við 2 aftrat.

Familju- og ungdómstilboð: Barnaforsorgin skal kunna veita betri tilboð til børn og ung hjá veikum familjum, á Barnaheiminum og á barna- og ungdómsstovninum Slóðin.

Barna- og ungdómspsykiatri: Nú verður settur skjøtil á at uppbyggja eina serliga barna- og ungdómspsykiatriska deild. Upphæddin skal eisini økjast munandi í 2008.

Ráðgevandi toymið fyri ungar kvinnur - er tilboð um ráðgeving fyri ungar kvinnur, sum umhugsa ella hava fingið fosturtøku, fyri barnakonur og stakar uppihaldarar, sum liva undir truplum umstøðum og hava tørv á stuðli. Upphæddin er fyri hálvt ár og skal upp í 1 mió. í 2008.

Sorgbólkurin Berin er fyri børn og vaksin sum hava mist. Við hesum skal bólkurin fáa eina fasta árliga upphædd á fíggjarlógini til stuðul til sjálvboðna virksemið.

Heima hjá sjúkum børnum: eins og hjá alment settum skal eisini við løggávu tryggjast tímaløntum endurgjald fyri at vera heima barnsins 1. og møguliga eisini annan sjúkadag.

– 12) eru alt familjupolitisk mál hjá øðrum landsstýrismonnum.

Eg skal í nøkrum komandi greinastubbum halda áfram við raðfestingunum á heilsuøkinum, eldraøkinum og rúmliga arbeiðsmarknaðinum.

# Sláturhús sum fornminni

DJÓRAVERNDARFELAGIÐ
Jonna Justinussen

Hví skulu vit í Føroyum vera so oldnordisk, tá tað snýr seg um dráp av seyði? Í degi og viku 2. okt. varð víst, hvussu menn drupu seyð, har bleiv framhevað, at her drupu teir upp á tann gamla mátan, sum um tað var í lagi.

Hvussu gamal skal mátin vera? Skulu vit aftur í miðøldina ella longur aftur, har byrsan ikki var uppfunnin?

Fyri umleið 30 árum síðani segði táverandi djóralæknin, Dánjal Bærentsen, at í dag er tað ongin sum stingur. Allir skjóta. Soleiðis at skilja, at í dag eru allir so skilagóðir og vilja drepa á skjótasta hátt. Og nú í dag 2006 letur tað til at vera í lagi at drepa, sum teir gjørdu í fornum tíðum. Sjónvarpsfilmurin varð gjørdur, uttan at nakar setti nakran spurning.

Frá pálítiligari keldu vita vit, at á eini útoyggj drupu tey seyð við at skjóta. Hetta er fyri minst 80 árum síðani og líka til denna dag. Hvussu gamal er tann "gamli" mátin? Er so ikki betri at spyrja, hvussu primitiv eiga vit at sleppa at vera í hesum landi?

Í sjónvarpssendingini blivu vit forskánaði fyri at síggja nógv blóð, vit sóu bert, hvussu pent og ruddiligt har sá út. Skjótt gekk tað fyri seg, professionelt arbeiði, og seyðurin var ikki niðurbundin. Tøkk fyri tað.

Allir eru minni enn so professionellir, og tað kann tó ikki tykjast annað enn óhugnaligt at hugsa sær, at tilkomnir, og má man rokna við væl at sær komnir menn, fyri at halda tað oldnordiska í hevd, óátalaðir og óstraffaðir læra synir sýnar at drepa seyð við at stinga. Einaferð skal vera tann fyrsta, og so kunnu teir standa har og prika og smástinga, meðan teir leita eftir tí rætta staðnum. Ímynda tær tað? Nei, ikki er tað nakað at reypa sær av, at man drepur seyð uppá tann gamla mátan.

Tá eitt lamb verður dripið við at verða stungið, so svímar tað fyrst av blóðmangul, og at enda doyr tað. Einaferð fekk Djóraverndarfelagið boð um ein mann, sum ikki dugdi at stinga, men gjørdi tað alíkavæl. Hevði sjónvarpið víst tað, so hevði alt Føroyaland verið á gosi, og tað hevði straks blivið forboðið at stungið seyð.

# Ferðasamband til Hestur og Koltur



HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri

**Bygdafólkið í Hesti og Koltri ynskir betri ferðasamband, tí hetta er ein fyritreyt fyri, at fólk verða búgvandi á oyggjunum**

Sum víst verður á í samgonguskjalinum, so hevur eitt væl útbygt og væl virkandi samferðslukervi alstóran týdning fyri trivnaðin í útjaðaranum og fyri vinnu og trivnað í landinum sum heild.

Tí verður heitt á landsstýrismannin í innlendismálum og Strandfaraskip Landsins um at bera so í bandi, at fólk í Hesti og Koltri fáa betri ferðasamband.

**Ferðasambandið til og úr Hesti**

Í løtuni er ferðasambandið vánaligt, hóast tað bara tekur eitt korter at sigla millum Hest og Gomlurætt.

Tá ferðast verður úr Hesti klokkan 17.15, mugu ferðafólkini bíða í Skopun í ein tíma, áðrenn tey kunnu sleppa víðari, og báturin er ikki á Gomlurætt fyrr enn klokkan 19, tá nógv tiltøk longu eru byrjað. Tí náa hestfólk ikki tiltøkini til tíðina. Heldur ikki sleppa tey heimaftur seinni um kvøldið, tí tá er eingin túrur.

Bygdarfólkið í Hesti ynskir, at beinleiðis rutusamband verður seinnapartin hvønn dag úr Hesti til Gomlurætt, umframt tilkallitúrar um kvøldið. Á henda hátt kunnu fólk verða búgvandi í Hesti, uttan at skula frásiga sær tey tilboð, sum eru í miðstaðarøkinum, so sum kvøldskúla og ymiskt tiltøk.

Hetta áttið at latið seg gjørt, tí sum skilst, so dýrkar hetta bara við oljuni. Manningin á Teistanum er til arbeiðis allíkavæl.

**Ferðasambandið til og úr Koltri**

Einasta sambandið til Koltur í dag er tyrlan, ið flýgur ein túr mikudag, fríggjadag og sunnudag. Í juni, juli og august er mánadagur aftrat. Skulu ferðabólk aftur og fram sama dag, má farast vestur í Vágar. Soleiðis sum tyrluflutningurin er nú, er tyrlan ógvuliga avmarkað og ikki so væl hóskandi til ferðafólkafluting út í Koltur.

Í Koltri verður stórur dentur lagdur á at menna ferðavinnuna. Fyri at hetta skal eydnast, má skip sigla til Kolturs, har ferðafólk kunnu koma aftur og fram sama dag. Tilkallitúrar kundu verið tvær ella tríggjar ferðir um vikuna.

**Samferðslan og ferðavinnan**

Sum víst verður á í álitinum um ferðavinnupolitik, hevur samferðslumøguleikin avgerandi týdning fyri ferðavinnuvøkstur uttan fyri miðstaðarøkið. Tey vitjandi noyðast at laga seg eftir, nær slepst til og frá oyggjunum. At betra um samferðslumøguleikarnar hevur tí stóran týdning fyri bæði íbúgvarnar á oyggjunum og ferðavinnuna.

Strandfaraskip Landsins er við sínum landsumfatandi flutningskervi kjarnin í innanlands ferðafólkaflutninginum, og hevur ein sera týðandi leiklut fyri ferðavinnuna sum heild og fyri økismenningina. Tí er reglusemi, kunning og tænastustøði stovnsins sera týdningarmikið.

Heitt verður tí á Løgtingið, Innlendismálaráðið og Strandfaraskip Landsins um at betra um samferðsluna til og úr Hesti og Koltri og at seta pening av til endamálið.

# Nú er bikarið fult!

EGIN HENRIKSEN

Sum tvingaður lisensgjaldari til Útvarp Føroya, vil eg mótmæla, at ein dag og dagliga í næstan hvørji tíðindasending, verður bombarderaður við homoseksuellari propaganda.

Eg taki fult undir við skrivi- og talufrælsi. Tað er í lagi at informera. Men tað er alstórur munur á at informera og at indoktrinera, og neyvan nakar ivi kann verða um, at tað er tað seinra, ið útvarpið ger, og tað í ólukku mát.

Útvarpið eigur at verða ein neutralur og objektivur stovnur, ið skal tæna og upplýsa borgaran og verja og styrkja føroyska mentan. Har átti einki lobbyvirksemi at funnist.

Men tíverri hevur hetta fyribrigdið verið at hoyrt, meir ella minni áhaldandi, frá einaferð seinasta summar, og tykist nú aftur at vaksa í intensiteti.

At mentamálaráðharri Føroya, Jógvan á Lakjuni, sum hægsti ábyrgdarhavandi av stovninum, kann standa modell til slíkt, er mær ófatuligt.

Ella er tað veruliga so, at hetta fer fram við signing landsstýrisins fyri at fremja visjónsætlanina – at »kultivera føroyingin« til at møta alheimsgeringini?